# Ársfrágreiðing fyri 2008

## Endamálið

Vinnuframagrunnurin varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframagrunn. Endamálið við Vinnuframagrunninum er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframagrunninum varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi umsitur Vinnuframagrunnurin eisini stuðulsskipan til skipasmíð.

## Árið 2008

Rentuinntøkurnar í 2008 vóru 2.874 tkr. móti 2.411 tkr. í 2007.

Vinnuframagrunnurin hevur í 2008 viðgjørt 41 umsóknir, harav 37 umsóknir vóru játtaðar. Í stuðli vórðu veittar 6.658 tkr., brutto, meðan 570 tkr. eru afturførdar. Nettostuðulin var sostatt 6.087 tkr.

Eginognin við árslok var 47.394 tkr., herav er stovnsfæið 42.879 tkr.

Við árslok 2008 er tøki peningurin 53.767 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul er 5.269 tkr. og skyldugt til landskassan er 6.231 tkr.

Sí hagtøl fyri 2004-2008 á næstu síðu.

# Hagtøl 2004-2008

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu fimm árini (í túsund krónum):




| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 1.605 | 1.100 | 2.200 | 1.850 | 2.700 | 9.455 |
| Menning | 809 | 1.561 | 2.747 | 2.635 | 1.953 | 9.705 |
| Marknaðarføring | 2.487 | 2.000 | 1.734 | 2.263 | 1.503 | 9.985 |
| Aðrar | 291 | 38 | 90 | 32 | 504 | 954 |
| | **5.192** | **4.699** | **6.771** | **6.779** | **6.658** | **30.099** |

Samlað fyri árini 2004-2008 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

